## Advent í Kristnastovu

Fríggjakvøldið klokkan 20 verður eitt uttandura hugnakvøld í urtagarðinum í Kristnastovu. Á skránni verður millum annað felagssangur, sangframførslur og sjónleikur. Eisini verður okkurt heitt at drekka og okkurt gott at eta. Stóri urtagarðurin er sera væl egnaður til slík tiltøk og vóna fyrireikararnir, at nógv fólk koma og at veðrið skikkar sær væl. Fyrireikararnir heita á fólk um at lata seg væl í til tiltakið. Men viðrar ikki, verður tiltaki sjálvandi flutt innum í salin. Leygardagin verður jólahald fyri børn kl. 15.00. Á skránni tá verður millum annað, jólaleikur, sangframførsla, felagssangur, søga og eitt lítið yvirraskilsi til børnini.



## Einskiljing kostaði 3 mió.

Kostnaðurin av einskiljingini av Atlantic Airways kostaði 3 milliónir krónur. Tað upplýsti Bjarni Djurholm, tá Fólkaflokkurin hevði landsfund um vikuskiftið. Til sammetingar upplýsti Bjarni Djurholm, at kostnaðurin av at einskilja Føroya Banka var millum 10 og 20 mió kr. Talan er um kostnaðin, sum ráðgevarnir hjá landsstýrinum tóku fyri sína ráðgeving. Tað var Kaupthing, sum stóð fyri ráðgevingini í samband við einskiljingina av Atlantic.

# Fiskamarknaður var eit

**Væl av fólki var samankomið á Toftum í gjár, nú stívliga 15 ár eru liðin, síðan Fiskamarknaður Føroya varð settur á stovn. Røður vórðu hildnar, og aftan á fingu fólk gott smyrjibreyð. Væl ljómandi harmonikutónar settu sín dám á løtuna, sum byrjaði úti í fiskamóttøkuni**



JUBILEUM

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Stovnandi aðalfundurin av Fiskamarknaði Føroya varð hildin 24. september í 1992 í Ólavstovu í Saltangará. Teir, ið standa sum formellu stovnararnir við 1000 krónum hvør í partapeningi, eru Olaf Olsen, Jógvan I. Olsen, Páll Gregersen og Ingvard Joensen. Ein fyribils nevnd varð vald á hesum fundi, og aftrat teimum fýra varð Jóhan Páll Joensen valdur. Fyrsta nevndin skipaði seg við Olafi Olsen sum formanni og Jógvan I. Olsen sum næstformanni.

Fyrsti stjórin í felagnum gjørdist Ditleif Eldevig, sáli. Hann byrjaði í starvinum 1. november í 1992 og gjørdi eitt stórt og slóðbrótandi arbeiði fyri at fáa uppboðssøluna at virka. Tað var ikki gamansleikur í teirri tíðini, sum var.

Fiskamarknaðurin sá dagsins ljós undir ringastu kreppu í Føroyum í nýggjari tíð, og tí gjørdist fíggjarliga grundarlagið undir felagnum sera veikt. Virkir, sum ætlandi skuldu gerast parteigarar, fóru hvørt undan øðrum beinleiðis og óbeinleiðis á húsagang, og tí var ikki lætt at fáa neyðuga partapeningin.

Nevndin aftanfyri felagið heitti tí á Føroya Fiskimannafelag og Tofta Arbeiðarafelag um at hjálpa til.

Fiskimannafelagið setti 200.000 krónur í felagið, og seinni kom Tofta Arbeiðarafelag eisini inn í myndina og er í dag størsti partaeigari við 400.000 krónum í partapeningi.

Í sambandi við 15 ára dagin hevur felagið latið gera ein snotuligan bókling um Fiskamarknað Føroya og søguna aftanfyri felagið. Tað er Óli Jacobsen, sum hevur tikið sær av at skriva um søguna og gongdina hjá felagnum, og við móttøkuna takkaði Kristian Fríðrik Olsen, stjóri í Landingarmiðstøð Føroya, honum fyri hetta arbeiði.

Við móttøkuna í gjár høvdu fleiri orðið, sum vit fara at venda aftur til í blaðnum í morgin.

Kristian Fríðrik Olsen beyð vælkomin, og Óli Jacobsen, Jógvan I. Olsen, Símun Johannesen, borgarstjóri og Jens Kristian Olsen, stjóri í P/F Faroe Fishmarket, høvdu allir okkurt at bera fram við høvið.

Í blaðnum í dag fara vit at tríva í framløguna hjá Óla Jacobsen, fyrrverandi formanni í Føroya Fiskimannafelag og fyrrverandi nevndarlimi í Fiskamarknaði Føroya.

### At verja borg

Óli Jacobsen segði seg fegnast um at vera við til hetta hátíðarhald, sum á ymiskan hátt nertir við ein stóran part av hansara virkisøki gjøgnum nógv ár.

- Bóklingurin, sum er lagdur fram, er søgan hjá vinnuni sum slíkari í samband við fiskamarknaðin, men eg fari at loyva mær at nema eitt sindur við mín leiklut sum formaður í Føroya Fiskimannafelag.

Hann segði, at tá ið hann gjørdist formaður í FF í 1971, setti hann sær sum mál, at virkið hjá felagnum skuldi fevna um øll øki, sum høvdu við fiskimenn og fiskivinnu at gera.

- Hetta skuldi gerast við sakligum undirbyggingum, sum skuldu vísa tað skilagóða í okkara tilmælum. Hetta er kanska ikki ein arbeiðsháttur sum skapar yvirskriftir, men hann er tíðarkrevjandi og gevur ofta úrslit.

Óli segði, at ein partur av hesi strategi var at fáa eitt felagsblað, sum skuldi røkka út til allar partar av samfelagnum. Blaðið skuldi tó fyrst og fremst verja áhugamálini hjá fiskimonnum og greiða frá støðu felagsins í avgerandi samfelagsmálum. Hetta eydnaðist sum frá leið sera væl.

- Við blaðnum eydnaðist eisini at verja borg hjá fiskimonnum á nógvum økjum, eitt nú ímóti tí ágangi, sum hevur verið ímóti skattaskipanini og inntøkutrygdini hjá fiskimonnum.

Hann segði, at hetta virksemi skapaði felagnum og harvið fiskimonnum vælvild og virðing millum fólk og myndugleikar, eisini út um landoddarnar.

- Hetta merkist ikki minst, nú blaðið er niðurlagt, legði hann aftrat.

### Prísáseting avgerandi

Ein heilt avgerandi faktorur fyri inntøkum fiskimanna er prísáseting. Tí er tað eitt upplagt øki hjá Føroya Fiskimannafelag at virka fyri fortreytunum fyri hægst møguligum fiskaprísum.

Óli vísti á, at felagið heilt frá 1975 var við í nevndini fyri ráfiskagrunnin, har hann sjálvur var limur øll árini.

- Um hesa tíðina mentu vit í felagnum eisini eina hagtalsskipan, ið er einastandandi góð. Henda skipan hevur eisini vakt ans millum serfrøðingar uttanlands. Við hesum tølum bar til at grundgeva fyri, at júst fiskasløg hjá okkara limum fingu bróðurpartin av tí studninginum, sum tá varð latin. Aðrir áhugabólkar høvdu stórt fortreð av hesum, men teir høvdu heldur ikki nøkur hagtøl at vísa á.

Óli segði, at tá ið vit komu fram til 1986, dugdu menn at síggja, at henda skipan